# Kærleikin vann á kalda krígnum



**Summi skulu so grúviliga nógv ígjøgnum, áðrenn tey kunnu fáa hvørt annað. Undir kalda krígnum, flýggjaðu rumenski Doru og føroyska Guðrið upp gjøgnum alt Europa fyri kærleikan**

KJERLIGHEIT
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Fyri júst 20 árum síðani fór 26 ára gamla havnagentan Guðrið Poulsen og ein vinkona á Interrail gjøgnum Europa.

Tær báðar endaðu millum annað í Barcelona, har tær fingu innivist á bíligasta gistingarhúsinum saman við fjakkarum úr øllum heiminum.

Men Guðrið, sum í dag er 47 ár og hevur egið keramikkverkstað í Havn, var heldur ikki farin til Barcelona fyri at uppliva luksus. Ætlanin var at síggja verkini hjá navnframa keramikkarkitektinum Gaudi. Men lítið visti hon um, at hesar dagarnir í Spania skuldu kollvelta tilveruna og kortleggja framtíð hennara.

- Tann eina dagin siti eg einsamøll á einari fortovskafé og drekki caffé latte, meðan eg eygleiði býarmeldrið á Plaza Real, sum er eitt satt inferno av lívi, larmi og litum. Vinkonan var farin við einum sjeiki onkrastaðni, og eg var bæði troytt og irriterað inn á hesar útlendsku mennirnar, sum alla tíðina royndu at koma í samband við meg. Ímillum teir var eisini Doru, sum eg ikki kendi tá. Hann sá eisini út til at vera í ringum lag. Eg hugsaði við mær sjálvari, at handan mannin tími eg ikki í hóslag við, minnist Guðrið Poulsen.

## Gerandisdagurin ræður

Guðrið og 54 ára gamli Doru sita undir liðuni á hvørjum øðrum við spísiborðið, við rokaðu bókahillini í bakgrundini. Vit eru stødd mitt í Havn, í húsinum har "Hjørnahandilin" var fyrr. Tey bjóða drekka úr keramikkkoppum og nýbakaðum hjarta-sconses við smøri og súltutoyi.

- Fyrsta árið tosaðu vit alla tíðina um, hvussu fantastiskt tað var, at vit bæði høvdu funnið hvønn annan. Tað var eitt satt undur, greiðir Doru á Torvlaðnum frá. Hóast eftirnavnið er føroyskt, orðavalið fullkomið og maðurin útróðrarmaður, so hoyrist, at hann er ikki føroyingur.

Doru er rumeni og flýddi til vesturheimin, tá kalda kríggið var upp á tað kaldasta. Sum so nógv onnur intellektuel, varð hann fongslaður heima í Rumenia fyri meiningar sínar. Leyslatin, tók hann beinini upp á nakkan og rýmdi yvirum.

- Tá eg hitti Guðrið, búði eg á einum pinka evarska lítlum kamari mitt í Barcelona í Spania saman við fleiri øðrum rumenskum monnum. Har var so trongt, at vit máttu skiftast um at vera heima og sova. Men tað hevði ongan týdning, tí vit høvdu allir tað í felag, at vit vóru flýddir undan harðrenda einaræðinum hjá Nicolae Ceauşescu í Rumenia, og vóru ovurfegnir um at vera á lívi, sigur Doru, sum hevur lisið filosofi á universitetinum í høvuðsstaðnum Bukarest.

Doru forklárar, at teir livdu í einum slagi av limbo, ella ongamannalandi, har teir bíðaðu eftir at fáa uppihaldsloyvi. Peningur og materiell virði høvdu púrt ongan týdning, og í prinsippinum kundu teir gingið naknir runt í gøtunum í Barcelona og kortini verið nøgdir.

- Vilt tú vera ein livandi menniskja, hevur frælsi alt at siga. Frælsi at gera, virka, liva og siga tað tú hevur upp á hjarta, uttan vanda fyri at verða avdúkaður ella settur fastur, hugleiðir Doru.

Hetta hevur eisini avspeglað livihættin í parlagnum hjá Guðrið og Doru. Gerandisdagurin skal hava innihald og vera drívmegin í tilveruni, meðan materiell virði ongan týdning hava.

- Tá eg flýddi úr Rumenia, visti eg, at eg fór ongantíð í lívinum at koma heim aftur. Hetta var sera svárt, eisini tí eg var so vónbrotin av landsmonnum mínum, sigur Doru, sum bara hevði ein dreym í lívinum: At sita á einari strond í Australia og kaga út á opið hav.

## Lofta lagnuni í løtuni

Sum sagt var Doru eisini í ringum lag hendan dagin í Barcelona. Men av onkrari orsøk kom hann upp á tal við Guðrið. Fyrst á fortovskaféini, og næsta samdøgrið alla møguliga staðni í spanska býnum.

- Allan dagin og náttina við spákaðu vit í gøtunum og prátaðu. Hvørgin okkara minnist akkurát, hvat vit tosaðu um. Men vit vóru ikki eitt sekund í iva um, at vit skuldu vera saman altíð. Vit vóru so samd um tey grundleggjandi virðini í lívinum, at vit vóru sum skapt fyri hvørt annað. Ein kundi sagt, at hesa náttina undir einari fontenu mitt í Barcelona forsegladu vit eina pagt ella ein ósjónligan sáttmála, sum hevur hildið síðan, sigur Guðrið.

Og Doru filosoferar víðari, at tað eru løtur í lívinum, sum fáa avgerandi týdning fyri restina av tilveruni, og tá mást tú vera til reiðar at lofta løtuni, ella lagnuni, um tú vilt.

- Hetta var so serligt, at eg trúgvi ikki, at tað var tilvildarligt, at eg og Guðrið møttu hvørjum øðrum. Vit vóru so ymisk, bæði mentanarliga og málsliga, og aldursmunurin var stórur, sigur Doru, sum rópar tað eitt "moment of clearness".

- Ein sætti sansur segði mær, at her var talan um eina stóra hending, sum eg ikki kundi lata fara framvið, sigur hann.

Næstu vikuna vóru tey bæði elskandi saman alla tíðina. Tann eina dagin fóru tey oman á skonnartina hjá Christoffer Columbus, sum liggur við bryggjuna í Barcelona. Har tóku tey eisini ring upp á.

## Dansa við mær!

Tað er ein kend søk, at í kærleika, og ikki minst í forelskilsi, finna fólk upp á alt møguligt svakt. Tann eina dagin vildi Guðrið kanna, hvussu sterkur kærleikin var, og hvussu langt Doru vildi fara fyri hana. Hetta var á alljósum degi á einum ósjarmerandi kafeteria, har nakrar sløvar sálir sótu og ótu av hvør sínum plastbakka.

- Dansa við mær, segði Guðrið við Doru, sum beinanvegin skilti boðskapin: reistist, bukkaði og bjóðaði henni upp.

- Har dansaður vit so runt. Tætt og forelskað, sum í einari psykosu. Fólk hildu okkum sjálvandi vera svøk, tí staðið var alt annað enn romantiskt. Sum um onkur knappliga fór at dansa kjálkadans á Sjómansheiminum í Runavík, flennir Guðrið, sum tó vísir á, at hendan hendingin hevði stóran týdning fyri hana. Tí, sum hon sigur: Segði hann ja við meg tá, so segði hann í veruleikanum ja til alt við mær.

## Misti sambandið í Europa

Men alt fær sín enda. Eisini ørligu dagarnir í nývunna kærleiksrúsinum. Guðrið og vinkonan høvdu alla tíðina ætlað, at interrail-túrurin eisini skuldi fevna um Grikkaland. Nú høvdu tær verið í Spania í eina viku, og vildu halda leiðina fram. Men kærleikin var vissur, og tí legði Guðrið nakað av viðføri eftir á kamarinum hjá Doru, og lovaði at koma aftur vikuna eftir, so tey kundu fylgjast upp til Føroyar saman. Tí tað høvdu tey longu avrátt: at Doru skuldu koma við heim til Føroyar, har tey vildu liva saman restina av lívinum.

Men Doru, sum var ikki vanur við at líta á fólk, var sannførdur um, at Guðrið góða ongantíð fór at koma aftur.

- Eg fór fullkomiliga í svart og drakk meg frá viti og skili í fleiri dagar fyri at gloyma hana, minnist hann.

So meðan Guðrið sat og longdist og læs kærleiksyrkingar eftir Neruda yviri í Grikkalandi, gekk Doru dýrandi fullur og grætt í Barcelona. Og tá hon so brádliga stóð í hurðini aftur, var hann sannførdur um, at hann var blivin svakur.

Við ongum passi ella visum, kundi Doru ikki ferðast lógliga um landamørk. Men hetta skuldi so ikki forða parinum, sum hevði sett seg fyri at giftast og at seta búgv í Føroyum.

Næstu dagarnar var ætlanin at fylgjast upp gjøgnum Europa við toki. Men áðrenn landamørkini skuldi Doru fara av, og snýkja seg framvið vaktunum til næstu tokstøð, har hann skuldi



Írsk hjarta-scones
4 dl. av hveitimjøli
2 tsk. av bakipulvuri
½ spsk. av sukur
½ tsk. av salt
3 spsk. av smøri
1 ¼ dl. av blak
Savna tilfarið og rulla tað út ½ cm tjúkt.
Stikk út við einum hjartaformi. Baka við 225 stigum í umleið 12 minuttir.